# BÝRÁÐSFUNDUR

**Dagfesting:** 08.05.2017 kl. 19:00

Nevndarlimir:: Dennis Holm
Eydis Kjærbo
Kirstin Strøm Bech
Levi Mørk
Anna Brattaberg Samuelsen
Eyðbritt Krosslá
Dánjal Bjarkhamar
Conrad Gaard Joensen
Erhard Joensen

Nevndarskrivari: Petry Joensen

| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | | |
| 37/17 | 17/00166-2 | Umsókn um matstovu- og skeinkiloyvið til ummælis Cafe Outdoor | 2 |
| 38/17 | 17/00125-2 | Niels Jacob Eysturberg vil leiga lendi á matr. 488a | 3 |
| 39/17 | 17/00067-3 | Bergur Vinther og Ólavur Dahl, umsókn um marknaumskipan | 4 |
| 40/17 | 17/00056-3 | Edvard Hjalt, Marknoyarvegur 28_umsókn um parkeringspláss | 5 |
| 41/17 | 17/00127-7 | Egon Fagraberg vil leiga lendi undir Bryggjuni 1, part av matr 306a | 7 |
| 42/17 | 17/00176-2 | Setan av vatnmeistara | 8 |

# 37/17 Umsókn um matstovu- og skeinkiloyvið til ummælis Cafe Outdoor

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 08.05.2017 | 37/17 | 17/00166-2 |

Vágs kommuna hevur frá Politinum 24. apríl 2017 móttikið umsókn um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi til Cafe Outdoor í Vági til ummælis.
Cafe Outdoor er átt av felagnum ÍVF Outdoor og skal búleikast á adressuni Garðabrekka 2, 900 Vágur. Stjóri er Petur Gotfredsson.

**Vágs Býráð 08. maj 2017:**
Einmælt samtykt at staðfesta samtyktina gjørda umvegis teldupost 3. mai 2017.

# 38/17 Niels Jacob Eysturberg vil leiga lendi á matr. 488a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 19.04.2017 | 29/17 | 17/00125-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2017 | 44/17 | 17/00125-2 |
| 3 Vágs Býráð | 08.05.2017 | 38/17 | 17/00125-2 |

Niels Jacob Eysturberg hevur pr. teldupost 03.03.2017 søkt um loyvi at leiga 1 jarðarstykki, ið liggur við Gjogvará, hetta fyri at nýta og umvæla gamla seyðarhúsið á stykkinum.

Talan er um matr.488a, ið er 372m2 og sum Vágs Kommuna eigur.

Stykkið er ikki útleigað í løtuni, men tað hevur verið útleiga fyrr. Táverandi leigarin varð uppsagdur síðsta ár.




**Tekniska- og umhvørvisnevndin 19. april 2017:**
Einmælt samtykt at leiga Niels Jacob Eysturberg jarðarstykkið. Málið verður beint í býráðið.

**Fíggjarnevndin 24. april 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við hesum.

**Vágs Býráð 08. maj 2017:**
Einmælt samtykt.

# 39/17 Bergur Vinther og Ólavur Dahl, umsókn um marknaumskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 19.04.2017 | 28/17 | 17/00067-3 |
| 2 Vágs Býráð | 08.05.2017 | 39/17 | 17/00067-3 |

Bergur Vinther  og Ólavur Dahl, hava umvegis teldupost sent Vágs Kommunu umsókn um marknaðarumskipan.

Málið snýr seg um uttangarðsumskipan.
Talan er um at:

- Matr.nr. 270a letur 2 gyllin til matr.nr. 356a
- Matr.nr. 270a letur 3 gyllin til  matr.nr. 319a

Sp/f Bergur Vinther hevur keypt frælsini frá Ólavur Dahl og vil hava tey lagt afturat til sínar matriklar.

**Tekniska- og umhvørvisnevndin  19. april 2017:**
Einmalt samtykt at viðmæla hesum. Málið verður beint í býráðið.

**Vágs Býráð 08. maj 2017:**
Einmælt samtykt.

## 40/17 Edvard Hjalt, Marknoyarvegur 28_umsókn um parkeringspláss

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska- og umhvørvisnevndin | 19.04.2017 | 27/17 | 17/00056-3 |
| 2 Vágs Býráð | 08.05.2017 | 40/17 | 17/00056-3 |

Edvard Hjalt, hevur við brævi dagft. 19.01.2017 sent Vágs Kommunu umsókn um loyvið til at gera eitt parkeringspláss vestanfyri húsini á Marknoyrarvegur 28.



EH ger vart við, at ein gamal lyktasteyri stendur til ampa mitt fyri innkoyringini til ætlaða parkeringsplássið, og ynskir hann henda fluttan.

TD hevur verði á staðnum og staðfest, at lítið pláss er millum grannahúsini, og at loyvið kann ikki gevast fyrr enn tað fyri liggja:

- Tekning/skitsa, ið vísur við mátum hvør ætlanin er
- Grannahoyring / loyvið skal fyriliggja

Edvard Hjalt býr í umráði A á Marknoyarvegi 28. Grundøkið er 530 m2. Parkeringsplássið verður 10-10,75 m2, sum ikki telist við í byggistiginum, ið annars lýkur krøvini til umráðið A.

Edvard Hjalt hevur 14.2.2017 latið inn eina skitsu av parkeringsplássið, ið verður 2 / 2.30 m breitt og 5 m langt. Parkeringsplássið verður ein pallur av timbri, hartil kemur stakit á 1 m hædd.

“Ein vanlig stødd á parkeringsplássið er 2,5 m x 5 m til støddar, t.d. á Torginum og uttanfyri hjá Frelsenshær”. Við einum 90° parkeringsplássið kann breiddin fara niður í 2.30 m. Parkeringsplássið kemur nærri enn 2,5 m í grannaogn. Birgir Jacobsen á matr.nr 617d hevur innlatið skrivligt grannaloyvið. Hoyringsskriv er sent til Birgir Jacobsen. Einki mótmæli.

At pallurin veður gjørdur av timbri og verður bygt beint í grannamark, kann av brunatrygdarligum ávum gerast ein vandi fyri grannaogn, um eldur skuldi komið í.

***FBR 17 5.5.3 Stk. 1***
***Uttandura yvirflatur, klæðing, takklæðing og ervaljós skulu gerast á ein slíkan hátt, at hesi sum minst økja um eldspjaðing umframt at vera brunatrygdarliga nøktandi.***
***Bygningar og partar av bygningi skulu staðsetast móti grannamarki, miðjum á gøtum og vegum við slíkari frástøðu, at eingin vandi er fyri eldspjaðing til bygningar á grannagrundøkjum.***

**Tekniska- og umhvørvisnevndin  19. april 2017:**
Nevndin mælir til at loyvi verður treytað av at tilfarið til pallin verður av betong ella ikki brændbarum tilfari. Nevndin loyvir, at lyktapelin verður fluttur. Málið verður beint í býráði

**Vágs Býráð 08. maj 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Teknisku- og umhvørvisnevndini.

# 41/17 Egon Fagraberg vil leiga lendi undir Bryggjuni 1, part av matr 306a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havna- og Vinnunevndin | 24.04.2017 | 10/17 | 17/00127-7 |
| 2 Vágs Býráð | 08.05.2017 | 41/17 | 17/00127-7 |

Egon Fagraberg hevur 25.3.2017 vent sær til Kommununa um møguleika at leiga lendi undir Bryggjuni 1, ið er partur av kajøkinum á matr. 306a. Øki er 74 m2.

Egon F. vil keypa bygningin á Brygguni 1 frá Lailu í Trøðini, men keypssáttmálin er treytaður av, at kommunan kann tryggja honum loyvi at leiga lendi undir bygninginum..

Núverandi leigari skyldar grundleigu á ca. 1000 kr.

Gomul skuld helst vera goldin, áðrenn nýggjur leigusáttmáli verður gjørdur.

**Havna- og Vinnunevndin 24. april 2017:**
Einmælt at loyva Egon Fagraberg at leiga lendi 306a. Samtykt er eisini, at gomul skuld skal vera goldin, innan nýggjur leigisáttmáli verður gjørdur.

**Vágs Býráð 08. maj 2017:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Havna- og Vinnunevndini.

## 42/17 Setan av vatnmeistara

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vágs Býráð | 08.05.2017 | 42/17 | 17/00176-2 |

Conrad Gaard Joensen, býráðslimur heitur í telduposti á Vágs Býráð um at seta ein vatnmeistara í starv.
Mælt verður til, at arbeiðsuppgávan hjá viðkomandi persóni burturav er at taka sær av vatnverki, vatnveiting út til borgaran og annað, sum tryggjar reint vatn til borgarar og vinnu. Men at býráðið áleggur Teknisku Nevnd at útgreina ein arbeiðssetning fyri ein komandi vatnmeistara.

Guðmundur Jacobsen røkti uppgávuna sum vatnmeistari til 31.01.2015, hann fekk 3.000 kr./mðr. fyri at røkja uppgávuna. Ongin hevur síðani havt ta uppgávuna, men Suni Poulsen og aðrir arbeiðsmenn hava tikið sær av alarmum osv. í felag uttan fasta samsýning.

**Vágs Býráð 08. maj 2017:**
Einmælt samtykt at beina málið í Teknisku- og umhvørvisnevndina.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Dennis Holm | Eydis Kjærbo | Kirstin Strøm Bech |
| Levi Mørk | Anna Brattaberg Samuelsen | Eyðbritt Krosslá |
| Dánjal Bjarkhamar | Conrad Gaard Joensen | Erhard Joensen |